PRIX

Prix Føroyar er ein tónleikakapping, sum Norðurlandahúsið í Føroyum skipar fyri í samstarvi við Føroya Undirhaldstónleikarafelag (FUT), Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya. Kappingin hevur verið hildin annað hvørt ár síðani 1995.

Kappingin er skipað við fimm innleiðandi umførunum, har vinnarin í hvørjum umfari kemur í finaluna. Bólkarnir, sum enda sum nummar 2 til innleiðandi umførini, skulu kappast í eini hálvfinalu, har vinnarin fær seinasta finaluplássi.

29 bólkar eru við í kappingini í ár. 6 bólkar sleppa í finaluna.

**1. umfar, 25. januar kl. 21.00**
Flux
S.C.A.T.G.O.H
Headache Blues Treo
Søren Søgaard
MC Hár
Human Chaos
Vinnari: MC Hár
Nummar 2: Headache Blues Tro

**2. umfar, 1. februar kl. 21.00**
Mind's Eye
Déjá Vu
onkikanndiskuterast.altkann
Speaker
Holgar og Villmenn
Vinnari: Déjá Vu
Nummar 2: Mind's Eye

**3. umfar, 15. februar kl. 21.00**
Braquet
Crashwave
Mary's Baby
Lawetz
Krit
Masha
Vinnari: Braquet
Nummar 2: Lawetz

**4. umfar, 22. februar kl 21.00**
Makrel
Chain
Side Effect
Fluffy Toys
MMM
Páll Finnur Páll
Vinnari: Makrel
Nummar 2: Fluffy Toys

**5. umfar, 8. mars kl. 21.00**
Týr
Zink
Blív
Jam
Gestir
Hatespeech
Vinnari: Hatespeech
Nummar 2: Gestir

# Leivur fær høvuðpínu

**Headache Blues Treo fer á pallin við nýggjum gittarspælara leygarkvøldið. Upprunaligi gittarspælarin er endaður á Cuba, og tí eru boð send eftir Leivi Thomsen**

AVLOYSARIN
*Eyðun Klakstein*

Headache Blues Treo hevur verið ein av best spælandi bólkunum í Prixnum í ár. Teir spæla blues-tónleik, og í fyrsta umfarinum gjørdust teir nummar 2.

Leygarkvøldið fáa teir so møguleikan at spæla seg í finaluna, og vápnið er enn einaferð vælspædir bluestónar.

Gittarspælari í bólkinum er – ella var – Búi Dam, sum er ein av okkara evnaríku ungu gittaristum. Hann verður ikki við leygarkvøldið, tí hann er farin til Cuba í tónleikaørindum.

Tí hevur kvartettin við høvuðpínuni sent boð eftir einum øðrum tiltiknum gittarspælara – nevniliga Leivi Thomsen.

Hann fer sostatt at spæla saman við tveimum øðrum royndum tónleikarum – Rógva á Rógvu og Edvardi Nyholm Debess – og tí unga Una Debes.

## Nógvar royndir

Leivur Thomsen er ikki ein og hvør. Tónleikarin, sum er búsitandi í Keypmannahavn, og er ein av monnunum aftanfyri føroyska MediaMusic studio á Amager, er ein av mest virdu føroysku gittarspælarunum.

Hann var við í Plúmm, tann tíð tað var, og hann var eisini ein sentralur tónleikari í Føstufressum, sum góvu eina tiltikna plátu út seint í áttatiárunum. Hann er útbúgvin sum solistur á konservatorii niðri.

Leivur Thomsen ikki er tann tónleikarin, sum hevur gjørt mest um seg í Prix Føroyum, men nú verður hann so at síggja og hoyra á pallinum í Fuglafirði. Hann skuldi koma til Føroya í gjár, og so skuldi seinastu venjingarnar hjá bólkinum gerast.

– Eg vóni, at vit kunnu fáa seinasta finaluplássið, men tað verður ein hørð kapping, sigur Uni Debes, sum er sangari í bólkinum.



*Leivur Thomsen fer at loysa Búa Dam av sum gittarspælarar í Headache Blues Treo*

PRIX - og tala ikki

# Ferðasamband heldur enn ferðandi sirkus



Hetta vikuskiftið er seinasta undanumfarið í Prix Føroyum, og tí er tað kanska hóskandi at taka eitt sindur saman um kappingina í hesum teigi. Prixið hevur verið sera sjónligt í føroyska samfelagnum seinastu vikurnar, og nógv hevur verið tosað aftur og fram um tónleik, bólkar, framførslur og tónleikarar.

Hesaferð valdu fyriskipararnir av Prix Føroyum at leggja øll tey innleiðandi umførini á sama staði – í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Hetta skuldi tryggjað tónleikarunum betur umstøður at spæla undir, og harvið skuldi tónleikaliga dygdin eisini betrast.

Tankin er góður, og hann hevur avgjørt havt nógv gott við sær. Mentanarhúsið hevur verið ein frálíkur karmur um kappingina, tiltøkini hava verið væl fyriskipað, undirtøkan hevur verið stak góð, starvsfólkini eru fryntlig og fyrikomandi, og umstøðurar á palli og í sali hava verið góðar. Tað hevur verið eitt sindur ymiskt, hvussu ljóðið hevur eydnast, men sum heild hevur tað verið gott.

Mentanarhúsið kann tó ikki í sær sjálvum borga fyri, at tónleikaliga dygdin verður betur. Karmarnir eru har, men so er tað upp til tónleikabólkarnar sjálvar at fylla hesar karmar og vísa tónleikaligu dygdirnar. Tað hava langt frá allir bólkarnir klárað, og støðið á hesum Prixnum hevur ikki verið hægri, enn tað var undanfarin Prix.

Sentraliseringin av Prixnum í Fuglafirði hevur skapt eina støðuga kapping, sum neyvan hevur verið virkað so væl áður. Útvarpið hevur kunnað sent beinleiðis frá øllum undanumførunum, og tað hevur økt um áhugan fyri kappingini. Tónleikarar, tøkningarar og fjølmiðlafólk hava havt góðar umstøður at arbeiða undir, og eisini áhoyrararnir hava notið gott av umstøðunum.

Men tað er eisini okkurt minus við at leggja Prixið á einum staði. Vandin er, at tað kemur at líkjast einum tónleikaligum vardum verkstaði uttan ta sjarmu, sum er við einum sirkusi, sum er á ferð. Prix Føroyar plagdi at leggja leiðina fram við í Suðuroy, Vágum, Strondum og Klaksvík, men soleiðis er ikki hesaferð. Umstøðurnar á hesum støðum hava verið ymiskar, og sumt hevur verið betur enn annað, men í øllum førum Prixið havt góðar løtur á hesum støðum, og eisini tónleikararnir hava fingið nakað burturúr.

Tað er trupult at siga, hvat hevur meira at týða fyri kappingina, men niðurstøðan í hesum teigi skal verða, at hetta var vert royndina og spældi væl av. Kanska hava broytingarnar til tað betra verið fleiri enn øvugt, men tað hevur eisini verið saknur í einum ferðandi Prixi.

Fyriskipararnir hava gjørt nógv burtur úr, at ferðasambandið til og frá Prixnum skuldi verið gott, og vit, sum hava ferðast til og frá kvøld eftir kvøld, hava fegnast um, hvussu gott sambandið hevur roynst.

Og so líka eitt, sum ætlanin var at nevna, fyrstu ferð hesin tátturin var í blaðnum, men sum datt niður fyri, so tað má bara koma nú sum trold af æske. Mentanarhúsið í Fuglafirði við øllum sínum besnissaðum detaljum, hugtakandi innrættningi og innbjóðandi fasilitetum hevur eitt keðiligt navn. Navnið spillur ongan, men alíkavæl. Mentanarhúsið í Fuglafirði. Tað er langt frá so elegant, sum húsið annars er, men nú vendist ikki aftur. Snotuliga búmerkið er gjørt og sett saman við navninum, og fólk hava vant seg við at nevna húsið við hesum navni. Men var tað nakað, sum skuldi verið gjørt umaftur, so var tað navnið á húsinum. Tað mátti borið til at havt fingið eitt styttri, vakrari, meira poetiskt navn til hetta frálíka hús.



# Lawetz liggur framvið

**Symfonikararnir í Lawetz eru kanska mest óvæntaða navnið í hálvfinaluni í Prixnum, men tað forðar teimum ikki í at stíla eftir einum finaluplássi leygarkvøldið**

LAWETZ
*Eyðun Klakstein*

Tað kom óvart á tey flestu, eisini tónleikararnar í bólkinum, at Lawetz skuldi koma víðari frá triðja umfari í Prixnum.

Bólkurin var púra ókendur áðrenn Prixið, og hann er mannaður við ungum tónleikarum úr høvuðsstaðnum, sum fyri stóran part spæla klassiskan tónleik.

Fýra av tónleikarunum í bólkinum eru við í Føroya Symfoniorkestri, og rocktónleikurn er í grundini eitt ískoyti til tann klassiska tónleikin.

– Vit høvdu ikki væntað, at vit skuldu fara at koma víðari í kappingini. Men tá ið vit høvdu verið á pallinum og spælt, og tað gekk stak væl hjá okkum, fingu vit eina vón um, at tað kanska fór at lata seg gera. Men tað var nú óvæntað hóast alt, sigur Ísak Sambleben, sum spælir bass í bólkinum.

## Klassiskur tónleikur

Lawetz er ein nýggjur bólkur, sum bara hevur spælt saman í eitt hálvt ár, hóast onkrir av tónleikarunum hava spælt saman í fleiri ár. Teir spæla lættan rocktónleik, og tað gjørdu teir so væl, at teir komu víðari frá 3. umfari í Prixnum.

Fýra av tónleikarunum í bólkinum fáast eisini við klassiskan tónleik. Høgni Reistrup, Ísak Sambleben, Rúni K. Mouritsen og Dávur Juul Magnussen spæla allir við í Føroya Symfoniorkestri, og í hesum døgum fyrireikar Rúni seg til eina upptøkuroynt til MGK, sum er fyrireiking til konservatorii.

Rúni hevur verið niðri seinastu vikurnar, og tað var ivamál, um trummuspælarin kundi koma heim til hálvfinaluna. Tað vísir seg nú, at upptøkuroyndin hjá honum er um tvær vikur, og so læt tað seg gera at koma heim at spæla.

Rúni gongur til frálæru niðri, so hann er væl fyrireikaður til MGK-royndini síðst í mars.



*Høgni Reistrup er sangari í bólkinum Lawetz. Hann og tríggir av hinum tónleikarunum í bólkinum eru eisini við í Føroya Symfoniorkestri*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Framtíðin

Lawetz er ein nýggjur bólkur, og tónleikararnir fáast eisini við annan tónleik. Tí er tað kanska upplagt at spyrja, um Lawetz hevur nakað framtíð eftir Prixið.

– Vit hava ikki tosað so nógv um hatta. Vit hugsa kanska ikki so langt fram í tíðina, sum aðrir bólkar gera, men vónandi heldur bólkurin fram. Fýra av okkum eru búsitandi í Havn, so tað liggur væl fyri at spæla saman, sigur Ísak Sambleben.

Um Rúni Mouritsen kemur inn á skúlan niðri, kemur tað kanska upp á tal at finna annan trummuspælara til bólkin, men teir ætla sær ikki at leypa fram av.

## Venja uttan sangara

Meðan fleiri av hinum Prix-bólkunum hava spælt til konsertir seinastu vikurnar, hevur einki verið at hoyrt til Lawetz, síðani bólkurin spældi í Prixnum. Orsøkin til tað er, at trummuspælarin hevur verið í Danmark hesa tíðina.

Men nú er hann heima aftur, og dúgliga verður vant í hesum døgum.

– Seinastu tveir dagarnar fara vit at venja uttan sangara, so hann kann spara røddina hjá sær til leygarkvøldið, sigur Ísak Sambleben.

– Vit vita ikki, hvørjum vit skulu rokna við leygarkvøldið. Har eru fimm sera ymiskir bólkar, sum koma at spæla , og tað er trupult at gera sær nakrar tankar um, hvussu dómararnir fara at døma.

– Mær dámdi sera væl Gestir, og eg rokni við, at teir verða størsta hóttinin fyri møguleikan hjá okkum at fáa finaluplássið. Teir spældu væl og høvdu nakrar góðar sangir, heldur Ísak Sambleben.

Lawetz fer at spæla somu sangirnar leygarkvøldið, sum teir spældu í innleiðandi umfarinum, men teir hava broytt útsetingarnar eitt sindur.

– Nú gleða vit okkum bara til at sleppa at spæla leygarkvøldið. Tað er ein kapping, og tað fær okkum at geva eitt sindur eyka, sigur basspælarin í Lawetz.

# Íri kemur at lurta

Millum mongu útlendsku gestirnar til Prix Føroyar finaluna síðst í apríl mánaði verður ein írskur tónleikaumboðsmaður.

Talan er um Bernie McGrath, sum rekur bookingfelagið MILive.

Hann kemur at lurta, hvat føroyskur tónleikur hevur at bjóðað, og hvør veit, um tað kann hava við sær uppgávur fyri føroyskan tónleik í Írlandi.

Umframt írska umboðsmannin, koma eisini fleiri danskir festivalfyrireikarar og tónleikafólk, og nú verður arbeitt við at fáa samband við norskan festival eisini.

PRIX

**Hálvfinala, 15. mars kl. 21.00**
Allir bólkarnir, sum endaðu sum nummar 2 í teimum fimm innleiðandi umførunum, kappast um eitt pláss í finaluni

**Finala, 26. apríl**
Tann stóra finalan í Norðurlandahúsinum. Seks finalistar kappast um sigurin í kappingini og møguleikan at spæla á donskum festivalum.

**Dómarar**
10 dómarar meta um framførslurnar hjá bólkunum til tey innleiðandi umførini. Teir geva bólkunum stig fyri teir ymsu partarnar av framførsluni. Stigini hjá øllum dómarunum verða tald saman, og síðani verður vinnarin funnin. Í finaluni eru 28 dómarar.

**Vinnarar**
1995: Moirae
1997: Mark No Limits
1999: Taxi
2001: Clickhaze

**Atgongumerki**
Atgongumerki til innleiðandi umførini kunnu keypast á Kunningarstovunum kring landið, í Mylnuni í Miðvági og á Shellstøðini í Gøtudali. Eisini ber til at keypa atgongumerki á www.billetmaskinen.dk
600 fólk sleppa inn til hvørt umfar.

**Bussar**
Í sambandi við kappingina leygarkvøldið koyra bussar til og frá tiltakinum.
Bussar fara úr Vestmanna, Sørvági og úr Havn kl. 20.00
Bussar fara av Toftum og Strondum kl. 20.30. Teir steðga ávíkavist í Leirvík og í Gøtu kl. 20.50.
Aftan á tiltakið koyra bussarnar heim aftur.

**Ferja**
Sjóvegis samband verður til Klaksvíkar kl. 03.45 av Fuglafirði. Ferðaseðlar skulu keypast í Norðoya Kunningarstovu og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

**Prix í Sosialinum**
Lagt til rættis:
Eyðun Klakstein
Teldupostur:
eydun@sosialurin.fo